

# Ódnarveður í Íslandi

Tað var av ringasta veðri á Suðurlandinum og Vesturlandinum í Íslandi í gjárkvøldið. Líka frá Vestmannaoyggjunum norður á Patreksfjørðin vóru boð eftir bjargingarfólki. Veðurstøðirnar máldu upp í 50 metrar um sekundið í hvirlunum, men løgreglan sigur fyri fjølmiðlunum, at fólk høvdu fyrireikað seg til ódnarveðrið, og tí hendu ikki teir stóru skaðarnir. Onkunstaðni fór streymurin, onkur tekja fór, og í Vestmannaoyggjunum mátti strandfaraskipið Herjólvur fáa hjálp frá einum sleipibáti til at sleppa at bryggjuni.

rir

a

hevur havt stóra ávirkan á undirvísingina av næmingunum.

Men hvat siga so næmingarnir sjálvir um hesa undirvísingina. Fyri Silas er eingin ivi um týdningin:

- Tað at man skal brúka høvdið at tonkja við, tá man spælir, - tað ger at man lærir betri, sigur hann við Sosialin.

Samrøðan við tíðindamannin verður órógvað at einum lærara, sum biður hann gera seg kláran at framføra eitt lítið lag fyri hinum.

### Nógvir nótar

Vit hava kortini ein spurning aftrat til Silas: - Hvat er ein violin?

- Tað er eitt, sum man kann fáa til at spæla ræðuliga nógvar nótar, slær hann fast.

Hann hevur fingið undirvísing í einaspæli og samanspæli síðani august mánað í fjør. Fyri hann er heldur eingin ivi um, at violinin er eitt frálíkt ljóðføri.

- Eg haldi, at violinin ljóðar øgiliga pent, slær hann fast.

Nú er tíð at gevast at tosa, tí øll hini í violin-orkestrinum eru klár at framføra.

Hann er skjótur at taka violinina fram úr serstøku taskuni, og ger seg til reiðar at spæla.

Lærarin slær tónan ann, og so er klárt til konsert!

flokk aftrat í granskingarverkætlanina, sum Fróðskaparsetrið og Læraraskúlin skipa.

### Samstarv við Finland

Samstarvið við finska tann systurskúlan gongur væl. Umboð hiðani vóru í Finlandi fyri kortum á Colourstringshátíðarhaldi og ráðstevnu, har verkætlan okkara fekk rúm fyri umtalu og góðum ynskjum.

- Vit høvdu sjónfløgu við av undirvísingargongdini í øllum ljóðførum, og fingu somuleiðis góð ráð og metingar um, hvussu tey út frá hesum meta støðuna og leiðina fram at verða.

- Hetta er góð trygd at hava í skjáttuni, nú vit eru í byrjanartilgongdini í hesi sera spennandi verkætlan. Vit læra ein hóp av hesum samstarvi, sum eisini fer fram elektroniskt um alnótina, verður sagt í eini frágreiðing um verkætlanina.

Føroyski fólkaskúlin hevur stóran tørv á skipaðum og skrásettum royndarvirksemi. Her er sjøtil settur á eina verkætlan, sum kann koma at hava stóran áhuga og týdning innan føroyska skúlaverkið og sanniliga eisini uttanlands.

Í heyst var ein lærari, sum undirvísir í hoyrilæru í Litum í Leiki, á ráðstevni í Danmark, sum danska kenslumálaráðið skipaði fyri um musisku/kreativu skúlatilboðini sum kveikjandi og mennandi spírar undir hinum lærugreinunum í fólkaskúlanum.

Bertel Haarder, skúlamálaráðharri dana, gjørdist so hugtikin, tá hann hoyrdi um okkara Litir í Leiki verkætlan, at hann harmaðist, at hann ikki hevði hoyrt um hetta fyrr, so skuldi havt fingið tíð burturav at framleggja hetta 'fantastiska projekt' fyri ráðstevnuluttakarunum!



*Silas Gudmund Hannesarson heldur, at hann lærir nógv í skúlanum, samstundis sum hann spælir violin*